

## KARÐAR

- Undirkarði
- Yvirkarði
- Skaft
- Tindar



*Karðað skinnull.*

## Karðing

Vaskaða ullin er illa fløkt. Tí er neyðugt at greiða hana á kørðum, áðrenn hon kann brúkast til at spinna ella tøva. Hetta er at karða.

Áðrenn karðað verður, er skilagott at skilja ullina og velja tað løttu burturúr. Ullin á rygginum á seyði er ofta tøvd av regni og vindi, og er seig at fáast við; letur seg illa karða. Legg hana til viks, hon er góð til mangt og hvat.

Vit karða ullina, sum hon er, rót og brodd saman. Hetta nevnist *samfingin* ull.

Hon hevur eginleikarnar av bæði rót og broddi í sær. Hon er ikki mjúk at hava næst at kroppinum, men er sterk og góð til eitt nú troyggjur. Henda ullin er løtt at fáast við hjá nýbyrjarum.

Tá ið tú ognar tær karðar, skalt tú velja, hvør skal vera yvirkarði, og hvør skal vera undirkarði. Hetta verður gjørt, tí at tindarnir venjast sum frá líður. Set eitt frámerki á yvirkarðan.

Ullin er ofta full í bosi og buski[10], hóast hon er vaskað, og tí er tað gott at hava eitt stykki at leggja á knøini.



*Gomul føroysk gáta: Rívast og klórast um dagin og hálsfevnast um náttina.*

## At leggja á karða

Set teg væl til rættis. Báðir føturnir hvíla væl á gólvinum. Hav glopp millum føtur og knø.

1. Tak upp í lógvan av samfingnari ull, 5 – 6 g.
2. Tæga[11] ullina
3. Legg ullina á undirkarðan.










**Tæga ullina áðrenn tú leggur á karðan, og legg hana so ullarhárini liggja sama veg, sum karðað verður.**

[10] **Busk**: Moli ella øgn av ruski, hvørki rusk ella busk, tað sást ikki eitt busk á klæðunum.

[11] **Tæga**: Draga ullina millum fingrarnar.

## Nú er klárt at karða

Tak yvirkarðan í høgru hond og karða einar 6-10 ferðir passaliga fast, so tú greiðir ullina væl millum tindarnar.

Ger long strok, so yvirkarðin verður leysur av ullini á undirkarðanum.





## Ullin verður flutt á yvirkarðan

1. Skaftakanturin á yvirkarðanum verður lagdur móti framkantinum á undirkarðanum. Drag móti tær sjálvari. *Sí tekning 2.*

2. Nú er ullin farin á yvirkarðan. Vend kørðunum og karða aftur 6 – 10 ferðir. *Sí tekning 1.*



1



2

## Ullin verður flutt á undirkarðan

1. Legg framkantin á yvirkarðanum móti skaftakantinum á undirkarðanum. Skumpa við lættari hond yvirkarðan frameftir móti knænum. *Sí tekning 3.*

2. Ullin er farin á undirkarðan. Tá ið ullin hevur verið bæði á yvir- og undirkarða, hava vit karðað eitt umfar. Karða eitt ella tvey umfør afturat. So er liðugt, og ullin skal loysast av kørðunum.



1



2



1

At karða



2

Flyta á yvirkarða



3

Flyta á undirkarða

## Ullin verður loyst av kørðunum

1. Fyrst loysa vit ullina av undirkarðanum, síðan av yvirkarðanum – ella umvent.

2. Nú er villin leysur, men hjálp til við hondini.

3. Legg karðavillarnar[12] lið um lið á eina avís. Tá ið einki pláss er eftir, leggur tú eina avís omaná til næsta lag av villum. Nú er lætt at flyta rúgvuna, uttan at villarnir fløkjast.




Villin verður eisini nevndur karði ella karðavilli.









*Ein karðavilli kann loysast í tvey løg.*



[12]**Villi**: Tað sum verður karðað.